# MJØLNIR MEIST




*Myndir: Álvur Haraldsen*

## Betri báðar dagarnar

Hilmar Jan Hansen

Avgerandi løtan í kvinnufinaluni í gjár var byrjanin av fjórða setti, tá hevarin hjá Mjølni, Eina Kalsø, servaði 10 bóltar á rað, so tað gjørdist 11-1 til Mjølnir. Hetta var mønustingurin hjá Fleyr, ið ongantíð kom fyri seg aftur.

– Ja, tað var ein góð kensla at koma so væl framum og tað hjálpti okkum eisini rættiliga væl. Men eg haldi, at vit høvdu munin báðar dystirnar, segði 20 ára gamla Eina Kalsø, ið viðgekk, at tað var eitt sindur møðsamt at skula spæla tveir dagar á rað.

– Vit vóru sjálvandi eisini móðar, men eru í góðari venjing, so vit eiga at orka tveir dystir á rað. Og av tí at vit vunnu leygardagin, var meira trýst á Fleyr, tí tær máttu og skuldu vinna. Men vit vistu, at vit vóru betri enn tær, og tað fingu vit eisini víst.

hilmarjan@sosialurin.fo

## Ongantíð vunnið so nógv

Hilmar Jan Hansen

– Nú hava vit vunnið alt, sum vit kunnu vinna, staðfesti ein av royndaru spælarunum hjá Mjølni er 28 ára gamla Lena í Buð, sum sipaði til føroyameistaraheitið, steypakappingina og tær báðar smáu kappingarnar, Fleyr- og Mjølnir-kappingina.

– Eg má viðganga, at hetta er nakað av tí besta, eg havi upplivað, tí tað má vera langt síðani, at eg havi verið við til at vunnið so nógv sum í vetur. Og eg haldi, at vit settu eina tjúkka reyða striku undir, at vit bara eru tær bestu!

Hon helt, at tað var eitt sindur tungt at koma í gongd í gjár, eftir ein harðan dyst dagin fyri, men tá so Mjølnir var komið í gongd, koyrdi tað bara:

– Eg haldi, at tað vísti seg, at vit høvdu nógv meira yvirskot enn tær, segði Lena í Buð.

hilmarjan@sosialurin.fo




**KVINNUFLOGBÓLTUR** Eftir eina javna fyrru finalu, har Mjølnir hevði munin á Fleyr, gjørdist seinna finalan ein uppvísningur frá Mjølni, ið var betri á øllum økjum og fult uppiborið streyk avstað við meistaraheitinum

Hilmar Jan Hansen

Vanligt er at siga, at stigatalvan lýgur ikki. Men nú stigatalvan ikki er endin, tí FM-finalur avgera, hvør í veruleikanum er best, má hjá kvinnunum í Eikliguni sigast, at stigatalvan ikki var heilt eftirfarandi kortini.

Tá sjálv landskappingin var av, var Fleyr ovast, men nú FM-finalurnar eftirfylgjandi eru spældar, er tað Mjølnir, ið situr á trúnini og kann breggja sær av at vera føroyameistari.

Leygardagin var ikki tann stóri munurin á Mjølni og Fleyr, men tá so seinna finalan var á skránni í ítróttarhøllini á Eiði í gjár, var eingin ivi um, hvat av liðunum var betri og hvat var verri. Nú gekk sjón fyri søgn, at Mjølnir á øllum økjum hevði munin og tí eisini fult uppiborið kundi leggja sær eitt meistaraheiti aftrat.

Mjølnir kundi sostatt seta eina tjúkka striku undir sigurin, ið gav felagnum tólvta meistaraheiti í meistaradeildini síðani 1986 – og tað fyrsta síðani 2005. Hetta merkir, at mest vinnandi felagið í føroyskum kvinnuflogbólti er aftur á slóðini við einum liði, ið er ein góð blanding av ungum og evnaríkum spælarum og so nøkrum, ið hava drúgvar royndir í skjáttuni.

### Útklassing

Í fjórða setti í gjár gjørdist talan um reina útklassing, tí Mjølnir vann tað 25-6! Eitt rættiliga óvanligt settúrslit í einum dysti millum tvey av bestu liðunum – og púra óhoyrt í eini finalu. Eina Kalsø legði botnin, tá hon servaði Mjølnir frá 1-1 upp á 11-1, og so var einki meira at gera hjá Fleyr, ið fullkomuliga fór í upployssn.

At enda vóru tað bara ein ella kanska tvær á liðnum hjá Fleyr, ið framvegis stríddust fyri sakini, tí restin hevði longu givið upp eftir vánligu byrjanina. Mjølnir kom enntá upp á 16-2, áðrenn Fleyr vann nakrar bóltar, men annars einki fekk gjørt fyri at binda fyri, tí dysturin longu var taptur uppi í høvdinum.

Seinna finalan í gjár byrjaði annars við, at Mjølnir lættliga vann